

Petrojarl Knarr á veg út á hav.

# Sjónband: Ein risi leggur út á hav

**Jógvan Hugo Gardar**

11.11.2014 - 22:05

Oljan.fo

4. november loystu teir endarnar á Petrojarl Knarr í havnini í Haugesund í Noregi. Tað er Havila Shipping sum hevur ábyrgdina av at toga risan út úr havnini við kós móti Norðsjónum.

Teekay-risin Petrojarl Knarr hevur verið á sleipistøðini hjá Aibel í Haugesund, har hann er gjørdur klárur til oljuframleiðslu.

Njål Sævik, stjóri hjá Havila Shipping, sigur í samrøðu við Maritime, at sleipið gongur gott, og teir eru ikki komnir uppá pláss enn.

Petrojarl Knarr er 256,4 metrar til longdar og 48 metrar breiður. Hann kann framleiða 63.000 tunnur av olju um dagin, og hevur møguleika at hava 800.000 føt av olju í tangunum umborð.

Petrojarl Knarr er eitt nýtt framleiðsluskip, ið kom av skipasmiðjuni hjá Samsung í Suður-Korea í september. Hann hevur síðani ligið í Haugesund, har Aibel hevur gjørt tað seinasta sum skal til áðrenn skipið kann flytast út á oljuleiðina har tað skal liggja.

